


www.oljan.fo

**Jan Müller** 15 - 08 - 2013

# Magni Arge- Arbeiða við sambandi til Noregs

Vit arbeiða stútt og støðugt fyri einum tryggum og álítandi sambandi til Noregs, sum hóskar til tørvin. Hetta er viðmerkingin frá Magna Arge, stjóra um í Atlantic Airways til tíðindini í gjár um, at eitt útlendskt flogfelag hevur ætlanir um at fara undir flogrutu millum Føroyar og Noreg. Oljan.fo kundi í gjár upplýsa, at eitt flogfelag í útlandinum hevur í hyggju at fara undir fasta heilsárs rutuflúgving mlllum Føroyar og Noreg. Hetta fyrst og fremst fyri at nøkta tørvin hjá teimum mongu føroyingum, sum arbeiða í norsku oljuvinnuni. Mynd Frá hátíðarhaldinum, tá Atlantic hátíðarhelt 25 ára dagin. Her Magni Arge, stjóri og Kai Leo Johannessen, løgmaður. Mynd Jan Müller/oljan.fo